PERISKOP
FORUM FOR KUNSTHISTORISK DEBAT

Periskop: Forum for kunsthistorisk debat

Nr. 32, 2024

“Føroysk listasøga í dag”

Heiti: “At síggja landsløg fyri sær: (sjálvs-)portrett av Ruth Smith”

Høvundur/høvundar: Maxine Savage

Blaðsíðutal: 58-65

Dagfesting: 31.10.2024

DOI: 10.7146/periskop.v2024i32.150459



MAXINE SAVAGE

# At síggja landsløg fyri sær

## (sjálvs-)portrett av Ruth Smith

*Skundmiklu hendur tínar*
*royndu at binda hana í myndum:*
*oyðudæmda landið*
*á glið móti havindum*
*móti veldiga einseminum -*
*sama yvirbrá sum í andliti tínum,*
*eisni tað myndað við skundmiklum hondum.*

-Karsten Hoydal, "Til Ruth," 1972[1]

Eg kom fyrstu ferð á verkini hjá Ruth Smith (1913-1958) í 2016, tá eg var á Listasavn Føroya í Tórshavn. Eg gekk um eitt hvítmálað horn, og har hekk *Andlitsmynd, Leif/Nes* (1957-1958) **[1]** við sínum orkuløddu penslastrokum, ríku litum, og teimum samanhópaðu, smáu húsunum við sjóvarmálan á Nesi – hesi, lærdi eg seinni, vóru eyðkenni í verkunum hjá Smith. Málningurin var hongdur upp sum ein landslagsmálningur, hóast heitið vísti á, at hann fyrst og fremst var eitt portrett.[2] Tað, sum fyrst dróg meg at málninginum, var portrettið av Leifi, soni Smith, og tað subjektið, sum málningurin eru blivin kallaður eftir. Ein bringumynd av Leifi kemur undan kavi á niðara høgra horni á verkinum og sýnist at vera ein spegling í eini vatnflatu, sum kanska er eitt vatn, meðan ein ójavnt gráblá bakgrund glæmir um herðar og høvd hansara og møtir bláum og ferskugulum bylgjum. Støddin á hesari møguligu spegling tóktist surreel. Og tá eg hugdi nærri, sá eg vegin fara undir vinstru øksl á Leifi og tvørtur um ella aftur um búkin á honum, hegnið, sum grensar móti ovara horni av teirri vatnlíknandi bakgrundini, og byrjanina á eini havsmynd við skýggjum á havsbrúnni. Hetta var ikki ein spegling, í hvussu er ikki í naturalistiskari merking, men eitt møti og samanrenning av landslagi og portretti.

Eftir at eg kom í samband við verkini hjá Smith í 2016, helt mín fasinatión fyri teimum fram. Tá eg varð boðin at luttaka í hesum savni, visti eg, at eg vildi skriva um hennara verk, tí tey verða lítið umrødd uttan fyri føroyskar og útnorðurlendskar listaskarðar. Tá eg hugdi aftur í hennara katalog, kom hendan undranin av portrett- og landslagsmøtinum fram á ein hátt, sum eg ikki hevði lagt merki til áður. Í granskingini um Smith verður ofta endurtikið (næstan sum okkurt slag av umbering fyri tað, sum varð uppfatað sum eina miseydnaða roynd at halda seg til eina sjangru[3]), at hon manglaði resursur – millum annað nóg mikið av útgerð, og at hon tískil ofta noyddist at endurnýta lørift (síggj Warming 2007, 81-82). Nils Ohrt (2015, 135) lýsir hennara sjangrublanding sum merkta av flótandi markamóti millum skitsur og liðug verk. Ohrt (2021, 243-4) tosar serliga um *Andlitsmynd, Leif/Nes* sum eitt óliðugt verk í *Millum Føroyar og málningin* frá 2021, tí „tað eru trý ymisk myndevni, ið eru málað ymsar vegir […]. upprunaliga ætlanin hjá Ruth var at mála útsýnið yvir Nes [… síðani] málaði hon silvitnið og síðani myndina av Leif. Málningurin er sum ein uppslagstalva við trimum




**[1]** Ruth Smith: *Andlitsmynd Leif/Nes,* 1957-8. Olja á lørift, 70 x 79 cm. Listasavn Føroya, Tórshavn.

myndum.“ Hóast hesar frágreiðingar eru sannlíkar, hava tær ongantíð fult nøktað mína fatan av verkunum eftir Smith. Tá eg fór ígjøgnum katalogið hjá Smith, blivu hesar frágreiðingarnar minni og minni sannførandi.

Hóast portrettið hjá Smith av soninum Leifi kveikti mína upprunaligu fasinatión av listakvinnuni, fari eg at kanna sjálvsportrettir hjá Smith í restini av hesi, serliga hvussu tey samskifta við, møta ella gerast landsløg. Eitt nú *Landslag málað út yvir sjálvsmynd* frá 1957 **[2]**. Tvey av høvuðsmotivunum hjá Smith eru sjónlig her: sjálvsportrettið og landslagið á Nesi. Sjálvsportrettið hjá Smith, sum varð málað fyrst, vísir yvirkroppin hjá subjektinum, sum vendir beint móti hyggjaranum uttan brillur og í reyðum klæðum (eitt vanligt eyðkenni í sjálvsportrettum hjá Smith). Ein gulur veggur og bókahillar eru at síggja í bakgrundini. Figururin er partvíst fjaldur við grønum og brúnum litum frá líðini á Nesi, sum sker diagonalt tvørtur um andlitið beint niðan fyri eyguni. Tey blá-grá-svørtu húsini í bygdini koma til sjóndar og eru staðsett á høkuni á figurinum, sum enn er eitt sindur sjónlig undir grønkuni. Brøttu líðirnar fjala yvirkroppin á figurinum, og reyðir armar og bringa kaga fram ígjøgnum skýggini og fjallið. Hetta verkið verður sýnt fram við landslagssíðuni uppeftir í kataloginum hjá Smith í tekstinum eftir Dagmar Warming frá 2007 um listakvinnuna, *Ruth Smith: Lív og verk.* Tó vísir landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum Sirið Stenberg (2023) á Facebook-síðuni hjá Ruth Smith Savninum hetta verkið fram við portrettsíðuni uppeftir og viðmerkir, at tað “kann vendast báðar vegir”. Hóast tað



**[2]** Ruth Smith: *Landslag málað út yvir sjálvsmynd,* 1957. Olja á plátu, 61.5 x 52 cm. Ruth Smith Savnið, Vágur.

avgjørt er møguligt, at Smith hevur hildið fram at mála Nes á andlitið, er tað torført at ímynda sær, at hennara andlit hóast hetta ikki framvegis hevði verið at sæð. Ja, tað er torført at ímynda sær, at hetta skal hava verið ein góður háttur at "endurnýta" eitt lørift uppá.

Kortini síggjast drøg av samanrenningini av portretti og landslagi longu í teimum eldri verkunum hjá Smith. *Sjálvsmynd* frá 1956 **[3]**, sum minnir um eitt líknandi portrett frá 1955, vísir subjektið sum bringumynd í trý-fjórðingsvinkli og staðsetir tað í opnum duri við landslagnum á Nesi í bakgrundini. Bakgrundin er næstan tvíbýtt, ljósi bláu liturin í hurðini og tann gula gáttin møta bláu, gráu og grønu litunum á kendu líðini á Nesi. Eins og við *Andlitsmynd, Leif/Nes* mislas eg hesa

**[3]** Ruth Smith: *Sjálvsmynd*, 1956. Olja á lørift, 78 x 58 cm. Listasavn Føroya, Tórshavn.



myndina í fyrstuni – ramman á hurðini var ramman á einum málningi, og uttandura motivið var eitt málað landslag. Í staðin hevur Smith flutt landslagið á Nesi inn í rammuna á sínum egna sjálvsportretti – her kann ikki nakað ráðaloysi ella endurnýtt lørift tulkast. Hóast portrettið vísir eitt vanligt motiv í kvinnuligum sjálvsportrettum, nevniliga listakvinnuna til arbeiðis við einari palett í hondini (Calabrese 2006, 223), vísir tað eisini áhugan hjá Smith fyri støðum – sjálvt vinstri kanturin av palettini tykist næstan at smelta saman við landslagið. Hin eyðkenda, reyða skjúrtan hjá subjektinum miðsavnar visuelt hesar báðar heimarnar í hennara list, samanrenningin á hennara palett: inni í heimi hennara og landslagið á Nesi. Ohrt (2015, 148) sær

palettina her sum eitt skjøldur og samanber subjektið við ein evropeiskan “málara prins,” men hon kann eisini vera eitt symbol upp á umskapan, sum ekkóar gáttina í durinum, eitt stað, har landslag gerst portrett, og portrett gerst landslag.

Eitt eldri portrett frá 1939, *Sjálvsmynd,* hevur líknandi kompositión. Subjektið í bringumynd hevur eisini palett og pensil í hond, hóast hin eyðkendi reyði liturin hjá Smith er avmarkaður til ein bjartan kraga, sum kagar fram undan einum grønum jakka, og ein farra av skarlaksreyðari máling - klár at blandast. Portrettið frá 1939 skilir seg frá teimum báðum frá 1950'unum í og við, at bakgrundin ikki er býtt millum tað, sum er uttandura, og hurðarkarm. Ístaðin grensar hvíti hurðarkarmurin móti høgra kantinum á myndini við ljósagrønum og gulum landslagslitum, sum taka yvir restina av bakgrundini. Um eitt annað sjálvsportrett hjá Smith við einari abstraktari bakgrund í ymsum bláum litum (Sjálvsmynd, 1950), skrivar Warming (2007, 94):

> [...] Hesa ferð tykist tað ikki, sum um figururin kemur út úr tí bláa litinum, men er í honum. Har er einki veruligt rúm aftan fyri hana, bert blái liturin og ein farri av eini vatnrættari vinstrumegin figurin, og tað ger, at áskoðarin fær eina kenslu av einum havi og himmali. Blái havliturin smýgur seg rundan um hana og fevnir hana lagnutungt [... sum er hon] í fanginum á bláa litinum.



**[4]** Ruth Smith: *Sjálv-smynd,* ca. 1958. Olja á timbur, 50 x 53.5 cm. Ruth Smith Savnið, Vágur.

Eg eri farin at síggja sjálvsportrettini frá 1939 og 1950'unum á líknandi hátt. Nes er ikki uttan fyri hurðina, bert fá fet burturi; heldur er tað longu her í heiminum hjá Smith og fevnir um hana/subjektið.

Um landslagið fevnir um subjektið í nøkrum av sjálvsportrettunum hjá Smith, so seyrar hennara líkskapur næstan hóttandi inn í landslagið í *Sjálvsmynd* (uml. 1958) **[4]**. Sum í *Andlitsmynd Leif/Nes* **[1]** verður spælt við støddina á bringumyndini hjá subjektinum, sum dominerar longdina á løriftinum. Formurin á húsunum á Nesi bleiktrar næstan aftan fyri andlitið á Smith, gráir skuggar aftan fyri hennara eygu og vangar. Teir bjørtu, grønu litirnir í líðini standa í andsøgn til tey grovu og avgjørdu, reyðu strokini, sum vísa ein vælkendan jakka. Teir bylgjutu, gráu og kollittu hárlokkarnir møta einum rekandi skýggi við líknandi litum. Tey bæði motivini eru týðilig, men í *Landslag málað út yvir sjálvsmynd 1957* er sundurskiljingin teirra millum ikki týðilig. Tá tú fert at granska verkini hjá Smith á henda hátt og hugsavnar teg um andlit og kroppar í hennara landsløgum og um landsløg í hennara sjálvsportrettum, byrjar tú at síggja ábendingar um samanrenningar allastaðni. Fingralíkir, sjógrønir formir stinga seg fram millum hús, og grasvaksnar forgrundir eru fyltar við svørðum, ið minna um sveiggið á eini nøs. Andlitið á einum subjekti, ið er merkt av aldri, bendir á skráðar brekkur og livandi bakgrundir, ið endurskapa aldur. Hendan dynamiska blandingin ger tað enn torførari at skilja sjangrurnar hjá Smith sundur.

Hin fragili skilnaðurin verður næstan gjørdur til einkis í *Landslag málað út yvir sjálvsmynd* (ódagfest) og *Kvøldarskíggj yvir sjálvsmynd* (1957). Nøvnini á hesum báðum verkunum avdúka snildir, tí tey kunnu bæði vera villleiðandi í sínum innihaldi. *Landslag málað út yvir sjálvsmynd* vísir eina myrka, skitsukenda samling av svørtum húsum, sum liggja í eini forgrund við bjørtum gulum, grønum og bláum litum við einum teksturerаðum svart-gulum massa í niðara høgra horni. Hesar formarnir møta glærum, hvítum, reyðum og sjóbláum strípum undir einum heitum, samdrignum himli. Sjónlig undir vatninum eru andlitsbráini hjá Smith: hennara myrka hár reisir seg upp úr vinstra enda av bygdini, eitt myrkt eyga flýtur yvir einum skorsteini á einum av húsunum, og ein nøs og ein munnur hómast og liggja við eina bleika linju (møguliga var hetta fyrr ein hill ella ein vindeygakarmur?) sum gongur upp gjøgnum miðjuna á skýnum og miðjuna á málninginum. Kragin á reyðu skjúrtini hjá figurinum og hallið ovast á hennara øksl hómast gjøgnum vatnið og himmalin. Gul-svarta massan verður kennbar sum hin helvtin av hennara búki og øksl. *Kvøldarskíggj yvir sjálvsmynd* vísir á sama hátt Smith, sum kagar fram gjøgnum eitt landslag, har helvtin av hennara ovurstóra andliti og bringu tykist at hvíla á einum skýggi, sum flýtur yvir havinum. Í tí seinna málninginum eru ljósapink, -lillaðir og -grønir litir, ið skola út á himmalin, sum gera tað enn torførari at eyðmerkja teir brúnu, appelsingulu og hvítu litirnar í figurinum hjá henni. Titlarnir á hesum báðum verkum (eisini *Landslag málað út yvir sjálvsmynd* 1957) miða eftir at vera deskriptivir, t.e. málningar, har ein sjálvsmynd varð málað fyrst, og síðani eitt landslag omaná. Við at fylgja hesi tíðarrøð geva titlarnir eisini eina orientering til hesi verk, sum kanska er óneyðug. Verkini verða landsløg við einari áhugaverdari bakgrundssøgu, men verða tó verandi landsløg. Eins og *Andlitsmynd Leif/Nes* fyrst og fremst verður eitt „portrett". Verkini tykjast sjálvi at flyta mørkini á hesum flokkingunum.

Og hesin kategori-trupulleikin greiðir kanska frá frá teimum umberingunum, sum ganga aftur í granskingini av verkunum hjá Smith. Warming og Ohrt viðurkenna ofta, at verkini hjá Smith ikki altíð síggja liðug út, at fleiri motiv møtast á einum lørifti, og at hon ikki hevði nóg mikið av tilfari. Hetta kennist ofta sum ein løgin játtan og mangan óneyðugt. Onkuntíð tykjast tey sjálvi at síggja avmarkingarnar á hesum sjónarmiðinum. Warming (2007, 82) leggur til merkis, at við at varðveita verkini hjá Smith hevur hon sæð, at "Friðleys, óliðug og hveppin eru verkini /…/ og tað er ætlandi ikki av tilvild, men fult og heilt tilvitað. Tað er ikki fyri at vísa ótryggleika, men fyri áhaldandi at søkja inn í ein sannleika við einum tryggum og sera álvarsomum arbeiðsháttalagi, ið konserveringin avdúkar". Og Ohrt (2021, 179), skrivar um ein málning,



**[5]** Ruth Smith: *Landslag málað út yvir sjálvsmynd.* Olja á lørift, 54 x 64.5 cm. Ruth Smith Savnið, Vágur.

at "hóast myndin er óliðug, er hon fullkomið listaverk, og tað er torført at ímynda sær myndina meira málaða." Kortini tykist hetta evnið um "tað ólidna" framvegis at plága, hvussu verkini hjá Smith verða móttikin. At siga, at hesi verkini eru óliðug, sipar til, at eitt endamál við hesum verkunum ikki varð nátt, at "sannleikin" í hesum málningunum er annarleiðis enn tann, vit hava framman fyri okkum.[4] At eitt landslag ikki veruliga er ein sjálvsmynd, og ein sjálvsmynd ikki veruliga er eitt landslag, verkini eru bara ikki liðug enn. Uppáhaldið, at verkini hjá Smith eru óliðug, verður at síggja til ofta nýtt til at idealisera málningarnar sum verk, ið heilt einfalt ikki eru og ikki fara at vera til, og til at minka um týdningin av verkunum, sum finnast.

Tendensurin hjá Smith at hugsa portrett og landslag saman er, sum eg vóni, at eg havi víst, ein sterkur tráður í øllum hennara savni. Og eg vil illa lýsa øll verkini, sum eru umrødd í hesi greinini, sum bara portrettir; vit kunnu síggja spor av modernari portrettlist og anti-portrettum

í hennara verkum. Omar Calabrese (2006, 24) staðfestir, at tjúgunda øldin var tíðarskeiðið har "sjálvsportrettið bleiv noktað ella enntá oyðilagt." Hendan hugburðin endurgevur Tomáš Jirsa (2016, 13), sum skrivar um portrettlist í tjúgundu øld og uppeftur og leggur til merkis, at „skøvað, meiggjað ella kámað andlit fáa ikki subjektið at vera til staðar, men fanga samleikan hjá tí í prosessini millum at birtast og hvørva." Á líknandi hátt umrøðir Judith Weiss (2013, 135, 140) formar í modernari portrettlist, "ið leggja dent á andlit, sum hvørva, sníkja seg burtur, strikast og oyðileggjast," og spyr "hvussu nógvum andliti er tørvur á fyri at umboða tað sum eitt slíkt?" Hesi konseptini finna øll samljóð í landsløgunum/portrettunum hjá Smith, har andlitið og samleikin hjá figurinum stríða ímóti stabiliteti og eru ofta floymandi. Definitiónin av anti-portrett hjá Johnstone og Imber (2021, 1) er sjálv so breið, at hon møguliga kann umfata "landsløgini" hjá Smith, tí anti-portrettið "stríðir ímóti ella órógvar tær viðurkendu, listasøguligu konventiónunum í sínari sjangru [...og] ber í sær ein hug at fara út um mark og at dálka „reinu" sjangruna, eisini tá hon paradoksalt sjálvrannsakar og regulerar síni egnu mørk." Eg veiti hesar ekspanderandi lesingar av portrettlist fyri at vísa, at okkum kanska ikki nýtist at órógvast av, at Smith sýnir áhuga fyri at ignorera sjangrumørk og framleiðir verk við einum anda av óstøðuleika ella tvílyndi. Í staðin vóni eg, at hendan greinin hevur megnað at víst, at landslags/sjálvportrett-hybridirnar hjá Smith eru ríkar, tilætlaðar kanningar av kensluligum og subjektivum úttrykki, sum eiga at vera kannaðar nærri í akademiskum høpi.

*Føroyskað hevur Beinir Bergsson*

**VIÐMERKINGAR**

1 Siterað í Warming 2007, Kai Nieminen týddi til enskt. Týðingar, sum annars ikki eru frámerktar, havi eg gjørt.

2 Hesin málningurin varð sýndur fram á portrettsíðuni í jarðarferðini hjá Ruth Smith. Tað var sýnt fram við síðuna av opnu kistu hennara. Til hetta høvið samanbar Nils Ohrt verkið við eitt slag av gravskrift (2021, 242).

3 Í granskingini er eisini ein onnur týðilig umbering, sum snýr seg um ta stóru mongdina av sjálvsportrettum, sum Smith skapti. Øll ávara um, at hendan gongdin ikki skal lesast sum prógv fyri narsissismu ella yvirdrivna sjálvsupptøku, men heldur sum eina neyðloysn, tí tann einasta modellin, Smith hevði til taks, var hon sjálv (til dømis: Ohrt 2021, 219; Warming 2007, 42). Hetta tykist óneyðugt og kynsbundið.

4 Brádligi deyðin hjá Smith í 1958 sum 45 ára gomul hevur uttan iva styrkt kensluna av, at tað, sum kundi havt verið, er rænt frá henni og av tí sama eisini frá okkum áskoðarum.

**BÓKMENTALISTI**


Calabrese, Omar. 2006. *Artist's Self-portraits*, Marguerite Shore týddi. New York: Abbeville Press.

Jirsa, Tomáš. 2016. "Portrait of Absence: The Aisthetic Mediality of Empty Chairs." *Zeitschrift für Medien- und Kulturforschung* 7(2): 13-28.

Johnstone, Fiona og Kirstie Imber. 2021. "Introducing the anti-portrait." Í *Anti-Portraiture: Challenging the Limits of the Portrait*, 1-23. London: Bloomsbury.

Ohrt, Nils, ed. 2015. *Júlíana Sveinsdóttir & Ruth Smith: Tvaer sterkar / To stærke*. Tórshavn: Listasavn Føroya.

Ohrt, Nils. 2021. *Mellem Færøerne og maleriet: Samuel Joensen-Mikines, Ruth Smith, Ingálvur av Reyni*. Tórshavn: Listasavn Føroya.

Stenberg, Sirið. 2023. "Opið er á savinum...": https://www.facebook.com/groups/373009938138895/permalink/626722316100988/ (seinast vitjað 1. februar 2024).

Warming, Dagmar. 2007. *Ruth Smith: Lív og verk / Life and art / Liv og værk.* Tórshavn: Listasavn Føroya.

Weiss, Judith Elisabeth. 2013. "Before and After the Portrait: Faces between hidden likeness and anti-portrait." Í *Inventing Faces: Rhetorics of Portraiture Between Renaissance and Modernism*, 133-146. Berlin: Deutscher Kunstverlag.